# Árni og Sirri við á Vørumessu

*Árni Brattaberg á básinum hjá Sirri. - Okkara vørur verða meira og meira eftirspurdar, sigur kreativi framleiðarin og nýskaparin.*
*Mynd: John Müller*




**- Vit hava keypt gomlu vevarnar hjá Ólavi Jensen, og í vetur fara hesir at mala og veva gardintoy og annað í Vági, sigur Árni Brattaberg**

VØRUMESSAN 2003
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Millum teir umleið 35 framsýnararnar á Vørumessuni á Nabbi seinasta vikuskiftið, var eisini fyritøkan Sirri, sum hevur heimstað í Vági.

Sirri virkar ymisk pløgg úr føroyskum tilfari, og alt hevur sín upprunaliga lit. Tað merkir, at ongar vørur verða litaðar, sum felagið letur av hondum.

### Altíð við

Árni Brattaberg, sum sjálvur umboðaði básin hjá Sirri á Vørumessuni, sigur, at síðan í mars 2000, tá ið Sirri sá dagsins ljós, hevur fyritøkan verið við á árligu messuni á Nabbi.

- Hóast vit eru væl runt í meginpartinum av landinum, hava vit øll árini, síðan vit byrjaðu, ynskt at verið við á Vørumessuni.

Hann vísir á, at her hevur Sirri ein góðan møguleika at vísa fram sínar vørur.

- Vit høvdu nógv vitjandi á básinum, og eg haldi, áhugin fyri okkara bási var stórur.

Árni leggur tó aftrat, at á eini slíkari messu er vanliga ikki nógv søla.

### Á fleiri støðum

- Vit hava sølu í Vági, Havn, Klaksvík, Runavík og í Vágunum. So, vit eru komin rímiliga væl út um landið.

Árni sigur, at í Havn eru vørurnar hjá Sirri at finna í Fútaskrivstovu, í Klaksvík hjá Vima, í Runavík í skósøluni hjá Torleifi, og í Vágunum eru vørurnar at finna á flogvøllinum.

- Á Gørðunum í Vági verður spunnið, bundið, tøvt, skorið og seymað, sigur hann.

Umframt ymiskar vørur – heilt frá vøttum til frakkar, spinnur Sirri eisini tógv.

Árni sigur, at Sirri framleiðir eini 60 ymiskar vørur – alt úr føroyskum tilfari.

### Keypt vevar

Um ikki so drúgva tíð, fer Sirri eisini at veva til ymisk endamál, eitt nú gardinur.

- Vit hava keypt vevarnar hjá Ólavi Jensen og fara at seta teir upp í Vági. Her fara vit at veva og seyma gardinur og annað úr vovnum tilfari.

Árni sigur, at allar vørurnar, sum Sirri framleiðir, verða framleiddar frá byrjan til enda í Vági.

Tilsamans 10 fólk eru í starvi hjá felagnum, og tá eru øll tey tikin við, sum eru í sjálvari framleiðsluni og tey, sum arbeiða í handlunum.

### Útlendingar keypa

Árni Brattaberg sigur, at størri helmingurin av vør unum, sum Sirri framleiðir, verða seldar útlendingum, sum vitja í Føroyum.

- Sum tíðin er liðin, eru vørurnar hjá okkum vorðnar meira og meira eftirspurdar, sigur kreativi framleiðarin og nýskaparin úr Vági.



*Stórur áhugi var fyri básinum hjá Ergo-og Hjálpitól*
*Mynd: John Müller*




*Birgir Poulsen, stigtakari. Saman við konu, børnum og versynum skipar hann fyri Vørumessuni*
*Mynd: John Müller*



Greið boð frá mentamálaráðharranum:

# Eingin samanlegging av ÚF og SVF

**Eftir at fólkaflokstingmaðurin Jákup Mikkelsen í gjár vísti á fyrimunirnar við samanlegging av ÚF og SVF, er Annita á Fríðriksmørk greið. – Tað er gott, at slík uppskot verða løgd fram, men eg ætli mær ikki at arbeiða við hesi ætlan, sigur ein avgjørdur mentamálaráðharri. Tó vil hon seta nýggja nevnd at tryggja óheftan tíðindaflutning**

LOFTMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Tingmaður Fólkafloksins í Norðoyggjum, Jákup Mikkelsen, vísti í Sosialinum í gjár á bæði kvalitativu og fíggjarligu fyrimunirnar við eini samanlegging av loftmiðlum okkara. Umframt at báðir stjórarnir, Mikkjal Helmsdal úr SVF og Jógvan Jespersen úr ÚF, ikki mettu fyrimunirnar við uppskotinum vera stórar, tykist mentamálaráðharrin úr Tjóðveldisflokkinum, Annita á Fríðriksmørk, heldur ikki taka undir við ætlanini.

- Hann skal fáa eitt erligt svar frá mínari síðu, og tað er gott, at Jákup Mikkelsen leggur hesa áskoðan fram og tekur evnið upp. Eg fari ikki at arbeiða við eini samanlegging av ÚF og SVF, men eg havi tó ætlanir um at betra um fleiri onnur viðurskifti á loftmiðlaøkinum, sigur ein avgjørdur mentamálaráðharri í aftursvari til Jákup Mikkelsen.



*- Jákup Mikkelsen skal fáa eitt erligt svar frá mær, og tað er gott, at hann leggur hesa áskoðan fram og tekur evnið upp, men eg fari ikki at arbeiða við eini samanlegging av ÚF og SVF, sigur avgjørdi mentamálaráðharrin, Annita á Fríðriksmørk, sum tó vil broyta skipanina á loftmiðlaøkinum*

### Nýggj kringvarpsnevnd

Í hesum sambandi sigur Annita á Fríðriksmørk, at neyðugt er at fáa ein millumlið millum landsstýrismann og stovnsleiðarar, og við eini broyting í kringvarpslógini er hetta gjørligt.

- Fyri at tryggja politiskt óheftum tíðindaflutningi og fjølmiðlavirksemi sum heild er neyðugt við eini nevnd, sum er ímillum landsstýrið og fjølmiðlastjórarnar, sigur Annita á Fríðriksmørk.

Í løtuni eru stovnsleiðararnir næstir í hierarkinum eftir landsstýriskvinnuna í Mentamálaráðnum uttan nakran millumlið, og við verandi støðu metir mentamálaráðarrin ikki, at politiski objektiviteturin er í hásæti.

- Tískil er brúk fyri nýggari nevnd ímillum landsstýrið og stovnsleiðarar, sum skal samtykkjast í tinginum, og er hetta neyðugt fyri at tryggja, at landsstýrið ikki viðgerð og tekur avgerðir um fjølmiðlastovnar við støði í partapolitikki.

### Solidariskt kringvarpsgjald

Annita á Fríðriksmørk leggur eisini dent á, at broytingar skulu fremjast við kringvarpsgjaldinum.

- Nú hækkaði kringvarpsgjaldið, og hóast samlaða upphæddin má vera tann sama, er neyðugt við eini meiri solidariskari skipan viðvíkjandi kringvarpsgjaldinum, sigur Annita á Fríðriksmørk.

Spurd, hvat hetta merkir, vísir mentamálaráðharrin ikki ítøkiliga á, um gjaldið beinleiðis og í bræði skal lækkast, men hetta tykist tó vera tað, Annita sipar til.

### Hvør sítt sjónarhorn

Viðvíkjandi uppskotinum hjá Jákupi Mikkelsen at fusionera loftmiðlarnar sigur Annita á Fríðriksmørk hinvegin, at fyrimunir eru at halda ÚF og SVF fráskild.

- Tá tveir fjølmiðlastovnar arbeiða hvør sær, verður tíðindaflutningurin altíð borin fram frá hvør sínum sjónarhorni, og júst við hesum fjølbroytni meti eg tað vera ein avgjørdur fyrimunur við tveimum sjálvstøðugum arbeiðsplássum, sigur Annita á Fríðriksmørk. Hon metir eisini kappingina millum útvarp og sjónvarp hækka um fjølmiðlastøðið og vera mennandi.

- Sjálvsagt er nakað av peningi at spara við eini samanlegging, og hesum eri eg samd við Jákupi Mikkelsen í, men viðvíkjandi áskoðanini um betri góðsku eri eg als ikki samd, og ætli eg mær tí ikki at arbeiða við hesi ætlan hansara, eru greiðu boðini frá Annitu á Fríðriksmørk úr Tjóðveldisflokkinum til tingmann Fólkafloksins, Jákup Mikkelsen.

### Langt á mál

Tá landsstýriskvinnan á henda hátt ikki tekur undir við eini samanlegging, sum tó ikki er nøkur nýggj hugsan, tykist tað vera langur vegur á mál hjá Jákupi Mikkelsen og øðrum at fáa realiserað hetta sjónarmið, sum í hesum føri hvørki hevur fingið undirtøku úr viðkomandi landsstýrið og heldur ikki millum stovnsleiðarar. Niðanfyri vísir formaðurin í Mentanarnevndini heldur ikki uppskotinum vælvild.

Formaðurin í Mentanarnevndini, Jógvan Arge:

# Samanlegging skaðar góðskuna

**- Sum fjølmiðlamaður sjálvur meti eg tað vera ein avgjørdur fyrimunur, at talan er um tveir sjálvstøðugar almennar fjølmiðlastovnar í staðin fyri ein einsamallan og sterkan loftmiðil, sigur Jógvan Arge. Hann metir seg ikki hava ein gegnistrupulleika, hóast hann bæði er formaður í Mentanarnevndini og varastjóri í ÚF**

LOFTMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Jógvan Arge er formaður í Mentanarnevndini, eftir at Annita á Fríðriksmørk fór niðan í Mentamálaráðið, og umframt hetta er hann varastjóri í Útvarpi Føroya. Tískil er Jógvan Arge sera viðkomandi í sambandi við uppskotið um samanlegging av SVF og ÚF, og hevur hann síni greiðu sjónarmið.

- Eg kann ikki siga, hvørja áskoðan Mentanarnevndin hevur, men sum fjølmiðlamaður meti eg tað avgjørt vera betri fyri tíðindagóðskuna at hava tveir sjálvstøðugar almennar fjølmiðlastovnar í staðin fyri ein sterkan og einsamallan, vísir Jógvan Arge á.

Sambært honum viðger nevndin bara mál, sum skulu í tingið, og hevur samanlegging av ÚF og SVF tískil ikki verið viðgjørd í Mentanarnevndini.

### Eingin gegnistrupulleiki

Jógvan Arge er rættiliga innarlaga í hesum máli, tí umframt sess sín í áður umtalaðu nevnd er hann varastjóri í ÚF. Hetta metir hann tó ikki hava nakran trupulleika við sær.

- Ein lærari kann viðgera skúlamál, fiskimenn og reiðarar kunnu viðgera fiskivinnumál, og á sama hátt meti eg tað ikki vera skeivt, at ein fjølmiðlamaður kann viðgera fjølmiðlamál, sigur Jógvan Arge.

Hóast talan í hesum føri er um ein ávísan stovn, har hann er varastjóri, sær Jógvan Arge ongan trupulleika við hesum.

*- Eg kann ikki siga, hvørja áskoðan Mentanarnevndin hevur, men sum fjølmiðlamaður meti eg tað avgjørt vera ein fyrimunur at hava tveir sjálvstøðugar almennar fjølmiðlastovnar í staðin fyri ein sterkan og einsamallan, vísir Jógvan Arge á, sum ikki heldur seg hava ein gegnistrupulleika sum varastjóri í ÚF*

